# Nú er nógmikið tagt

HEÐIN JØRGENSEN

Ofta verður hildið, at tøgnin kann vera pínlig. Pínligt er tað eisini, nú kommunurnar handanfyri eru komnar væl áleiðis við at leggja saman í eina kommunu, at Sørvágs bygdaráð ikki vil taka málið upp á tunguna, men heldur velur at standa uttanfyri, meðan kortini verða blandað.

Pínliga tøgnin hevur valdað nóg leingi, og nú mugu borgarar í Sørvágs kommunu sleppa at taka støðu til henda týdningarmikla spurning.

Úteftir kann tað tykjast, sum sørvingar ikki vilja verða við. Men soleiðis er veruleikin tíbetur ikki. Tí tosar tú við fólk í Sørvági, vísir tað seg, at stórur partur meinar, at eisini Sørvágs kommuna sjálvandi eigur at verða ein partur av eini kommunusamanlegging.

Men við at mana alt tos um samanlegging í jørðina, hevur tað eydnast verandi bygdaráði at parkera Sørvágs kommunu uttan fyri verandi samráðingar og ávirkan av eini samanlegging, sum helst kortini kemur um ikki so langa tíð.

Tað ljóðar nevniliga, at landsstýrismaðurin í kommunumálum arbeiðir við lógarsmíði, ið tvingar Vágar í eina kommunu, og at hetta væntandi kemur at henda longu mitt í komandi kommunuvalskeiði, ella um góð tvey ár.

Í meðan hinar kommunurnar samráðast um stór og smá viðurskifti í eini nýggjari felagskommunu, sita vit og vilja ikki vera við. Neyvan nýtist einum at vera tann stóri kortspælarin fyri at skilja, at eftir at tey bestu kortini eru givin, verður neyvan nakar trumfur eftir til Sørvág.

Heldur enn at bíða, eigur Sørvágs kommuna tí at gerast partur av eini samanleggingar-tilgongd beinanvegin, so at kortini kunnu verða javntbýtt millum partarnar.

At óttast fyri tí, vit kunnu missa, heldur enn at síggja, hvat vit kunnu vinna, kann koma at kosta okkum dýrt.

Vóanandi fara borgarar í Sørvágs kommunu at taka henda spurning í stórum álvara, nú farið verður undir at tekna listar til kommunuvalið í november.

Eg eri ikki bara fyri, at verða við, men ætli mær eisini at víða mína borgarligu skyldu fyri einum, ið er sinnaður at venda vandakósini hjá verandi bygdaráð og atkvøða fyri hesum.

# Topaz ein mistur gimsteinur

MAUD WANG HANSEN



Bjarti Mohr, stráðmaður ella ábygdari fyri lagnurnar á Topaz.

LÍV sum umsitur risastórar upphæddir hjá vanligum løntakarum í Føroyum.

M. a. eru liminir í Føroya Pedagogfelag við til at figgja virksemi hjá Bjarta Mohr.

LÍV sum veitir limum sínum trygd móti at koma illa fyri vegna álvarsliga sjúku, ella tí tú missir førleika í arbeiðsárunum.

Kjakið hevur verið fammi um at gera etiskar íløgur, og hevur LÍV tá sagt við okkum sum gjalda teirra løn, at teir ganga fult inn fyri at seta okkara pengar í etiskt forsvarligt virksemi.

Eg havi sera torført við at síggja etikkin og virðini í tí sum gongur fyri seg umborð á Topaz. Mannalagnur sum eru drivnar til desperatión, tiknar gíslar í einum frammandum landi langt frá familju og kendum umhvørvi.

Tá ein russiskur trolari fyri umleið einum ári síðani lá í Føroyum, avdúkaðu fjølmiðlarnir mannminkandi korini teir livdu undir. Tí teir onga løn høvdu fingið í mánanvís, settu vit neyðhjálp av til at bjarga hesum monnum frá teirra vanlagnu. Og vit vóru skelkað.

Nú leggja vit, ikki bara Bjarti Mohr men alt føroya fólk, navn til somu vanlagnuligu kor úti í heimi Tað var ikki hetta vit ætlaðu at seta sum okkara fingramerkið á heimskortið.

Bjarti Mohr er familjumaður og býráðspolitikkari, tað vit kunnu kalla ein vanligur borgari kanska, men er hann ábyrgdari ella bara eitt navn í øllum hesum skitna spæli?

Aftur til LÍV. Sum vanligur tryggingartakari, seti eg stórt spurnaðartekin við at ein investorur við 40% av partapeningi í einum reiðaríði, ikki langt síðan hevur rópt varskó áðrenn málið er komi so vítt.

Hetta eru mínir pengar tit umsita, og sum fíggja bæði tykkara løn og virksemi, hetta eru pengarnir hjá Palleba sum vera brúktir til at oyðileggja okkara umdømi, okkara etik og virðir úti í heimi og ikki minst heima í Føroyum.

# Fyri seinastu ferð, Jan

SJÚRÐUR SKAALE



**Fyrst vil eg takkað tær fyri tey rósandi orðini um mítt virksemið á Christiansborg sum heild :-)**

Men so blívur tú við at siga, at eg havi spurt stjórnina um hvat føroyingar kunnu, og nú enntá eisini at eg havi roynt at "umvenda forsætisráðharran og meirilutan av fólkatinginum, til loysingarfólk".

Tað nyttar ikki at halda fram at endurtaka hetta, tí tað er ikki beint, Jan.

Ein flokkur og stjórnarleiðarin førdu fram sjónarmið á fólkatingi um Føroyar og donsku grundlógina, sum eru skeiv. Tí tók eg spurningin upp, greiddi frá hvussu veruleikin er, og spurdi um forsætisráðharrin ásannar henda veruleika. Eg havi ikki biddað um nakað ella spurt um loyvi til nakað.




